Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Børn og inntøkukrav til útlendingar

Spurningar:

1. Hvørji rættindi hava børn hjá útlendingum við uppihaldsloyvi, sum eru fødd í Føroyum áðrenn 2. september 2023?
2. Hvørji rættindi hava børn hjá útlendingum við uppihaldsloyvi, sum eru fødd í Føroyum 2. september 2023 ella seinni?
3. Eru dømi um, at børn, sum eru fødd í Føroyum av útlendingum, ikki hava fingið uppihaldsloyvi, eftir at nýggju reglurnar um inntøkumark vórðu settar í gildi 2. september 2023, hóast foreldur teirra hava uppihaldsloyvi eftir gomlu reglunum?
4. Ber til hjá útlendskum hjúnum sjálvi at gera av, hvør teirra er "høvuðspersónur/sponsor" og hvør av teimum er "samfylgjandi familja", tá uppihaldsloyvi skulu leingjast?

Viðmerkingar:
2. september í 2023 vórðu nýggjar reglur settar í verk á útlendingaøkinum. Tá varð krav sett til inntøkuna hjá útlendingum við vinnuligum uppihaldsloyvi, sum ynskja at fáa familjuna við sær til Føroyar. Hetta fyri, at familjurnar skulu megna at forsyrgja sær sjálvum í Føroyum. Reglurnar eru ikki galdandi fyri útlendingar, sum hava søkt um uppihaldsloyvi áðrenn 2. september 2023 ella fyri útlendingar, sum leingja verandi uppihaldsloyvi, sum er givið eftir gomlu reglunum.

Undirritaða er gjørd varug við, at trupulleikar stinga seg upp, um útlendsk hjún fáa børn, meðan tey eru í Føroyum. Útlendingar, sum svara hvørjum sítt, og sum hava fingið uppihaldsloyvi áðrenn reglurnar um inntøkumark vórðu settar í gildi, koma undir nýggju reglurnar við inntøkumarki, fyri at nýføddu børn teirra skulu fáa uppihaldsloyvi í Føroyum.

Tað kunnu vera nógvar orsakir til, at útlendsk hjún ikki liva upp til nýggju reglurnar um inntøkumark. Fíggjarstøðan kann vera broytt soleiðis, at makin, sum upprunaliga var "høvuðspersónur/sponsor" fyri samfylgjandi familjuna, ikki longur hevur berandi inntøkuna í familjuni og tí ikki livir upp til inntøkumarkið eftir nýggju reglunum, men at hjúnafelagin/makin hevur nóg stóra inntøku – og at tey samanlagt hava eina ríkiliga stóra inntøku til at forsyrgja sær sjálvum og børnum sínum.

Á Løgtingi, 5. apríl 2024

Liljan Weihe